# Helvtin framleiðir tríggjar fjórðingar

**Helvtin av mjólkineytunum í Føroyum eiga tríggjar fjórðingar av samlaðu mjólkaframleiðsluni. Hin helvtin kostar landbúnaðinum einar 15 mió krónur árliga.**



*Einar Ellingsgaard, royndarstovuleiðari á Royndarstøðini, veit ikki, hví so nógvir bøndur velja ikki at vera við í eftirlitinum, tá tað bæði er ókeypis, og tykist vera eitt avbera gott amboð at menna framleiðsluna og lønsemi við*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

MJÓLKAFRAMLEIÐSLA
*Jóanes N. Dalsgaard*

Fyri tey flestu er mjólk nakað man keypir í handlunum. Men áðrenn mjólkin kann koma á hillarnar í handlunum, skal hon framleiðast. Aftur her man tað vera so, at nógv hugsa um mjólkavirki, tá tey hugsa um mjólkaframleiðslu. Men søgan byrjar heldur ikki her. Røsk eru tey uttan iva á Mjólkavirkinum, men mjólk duga tey tó ikki at gera. Tað duga afturfyri tær uml. 1100 mjólkkýrnar hjá teimum uml. 75 mjólkaframleiðarunum í Føroyum. Árliga framleiðslan av mjólk í Føroyum liggur um 6 mió litrar ella góð 6.000 tons. Hetta merkir, at hvør kúgv í miðal gevur uml. 5.600 litrar av mjólk um árið.

## Kynsbót er framleiðslumenning

Eins og í allari aðrari framleiðsluvinnu snýr tað seg í mjólkaframleiðsluni um, at fáa so nógv burturúr íløgunum sum gjørligt. Týdningarmesta tólið í mjólkaframleiðsluni má sigast at vera kúgvin. Uttan kýr ongin mjólk, so einfalt er tað. Fyri at fáa sum mest burturúr teirri einstøku kúnni, má hon fáast at mjólka sum mest, so leingi sum gjørligt. Men frá náttúrunar hond er tað ymiskt frá kúgv til kúgv, hvussu nógv hon mjólkar. Møguleikin fyri at finna eina góða kúgv í rúgvuni er tískil nakað tann sami, sum møguleikin fyri at finna eina vánaliga kúgv. Hetta er, um farið verður fram eftir fummum. Men tað hava uml. helvtin av mjólkaframleiðarunum í Føroyum valt ikki at gera. Í staðin fyri at fara fram eftir fummum, og vóna, at eydnan fylgir einum, hava hesir valt at fara miðvíst til verka, og skipa útveljingina av kúm, eftir hvussu væl tær mjólka. Bara kálvar undan teimum bestu kúnum vera settir við, og soleiðis vera tær ílegurnar sum geva nógva mjólk førdar víðari frá ættarliði til ættarlið. Hesin framferðarháttur er tað, vit vanliga nevna kynsbótararbeiði.

## Hentir og neyðugir upplýsingar fyri einki

Fyri at kunna gera kynsbótararbeiði krevst neyv vitan um, hvørjar eginleikar alidýrini hava, t.e. í hesum føri vitan um, hvussu væl kúgvin mjólkar. Tað er her, at mjólkakanningarnar hjá neytaeftirlitinum hjá Royndarstøðini koma inní myndina. Einaferð um mánaðin verður mjólkin frá hvørjari einstakari kúgv kanna. Kannað verður, hvussu nógv kúgvin mjólkar, og eisini verður innihaldið av fiti og proteini í mjólkini kannað. Harumframt ber til, við framkomnu útgerðini hjá Royndarstøðini, at síggja um kúgvin er skeivt fóðra, um mjólkin er skeivt viðfarin og um mjólkingarútbúnaðurin er í ólagi, alt bert við at kanna mjólkina. Harafturat ber til at fáa upplýsingar um heilsustøðuna hjá kúnni, fyrst og fremst um standin í júðrinum. Tað er rættiliga vanligt at neyt fáa júðurbruna. Tess skjótari hetta verður staðfest og viðgjørt, tess skjótari kann kúgvin aftur mjólka uppá tað besta. Júðurbruni kann ikki altíð staðfestast við dagliga eftirlitinum í fjósinum, og í tílíkum førum eru kanningarúrslitini frá Royndarstøðini sera hent. Alt hetta fær einstaki bóndin fyri einki. Skipanin við neytaeftirlitinum er nevniliga ókeypis.

## Nógvir pengar at vinna

Nógv bendir á, at neytaeftirlitið ber frukt í kynsbótararbeiðinum. Í Føroyum eru uml. 1100 mjólkkýr, sum mjólka í miðal 5.600 litrar um árið hvør. Av teimum 1100 eru uml. 600 við í neytaeftirlitinum. Men hesar kýrnar mjólka í miðal væl omanfyri 7.000 litrar um árið. Hetta merkir, at kýrnar, sum ikki eru við í neytaeftirlitinum í miðal mjólka væl undir 3.000 litrar um árið. Talan er sostatt um ein mun uppá í miðal uml. 4.000 litrar um árið fyri hvørja kúgv. Í krónum og oyrum verður hetta til rættiliga stórar upphæddir í mistari inntøku, fyri tann bóndan, sum ikki ger miðvíst kynsbótararbeiði. Sambært árbókini hjá Hagstovuni er bruttovirði á 4.000 litrum av mjólk omanfyri 20.000 krónur. Fyri ein bónda, sum eigur 10 mjólkkýr, kann talan soleiðis verða um ein árligan miss í bruttoinntøkuni uppá 200.000 krónur. Og her skal enntá havast í huga, at bóndin einki hevur spart, við ikki at vera í neytaeftirlitinum. Samlað er talan kanka um eitt bruttotap fyri føroyska landbúnaðin uppá einar 15 mió krónur um árið.

## Ikki arbeiðsbyrðan sum forðar

Sosialurin hevur spurt Einar Ellingsgaard royndarstovuleiðari á Royndarstøðini um hann veit, hví so nógvir bøndur velja ikki at vera við í eftirlitinum, tá tað bæði er ókeypis, og tykist vera eitt avbera gott amboð at menna framleiðsluna og lønsemi við. Men Einar Ellingsgaard hevur einki svar uppá henda spurningin. Hann sigur, at eftirlitið krevur eitt lítið sindur av eykaarbeiði í sambandi við mjólking eina ferð um mánaðin. Men í mun til tað gagn, sum góðskueftirlitið kann gera, hevur eykaarbeiðið lítið uppá seg, heldur hann.

## Eftirlitið gevur betri mjólk

Sosialurin hevur eisini spurt stjóran á Mjólkarvirki Búnaðarmanna Eirik Thorvaldsson, hvørja hugsan hann hevur um neytaeftirlitið. Erikur Thorvaldsson er ikki í iva um, at eftirlitið hjá Royndarstøðini gevur betri mjólk. Tað er heilt týðiligt samband ímillum eftirlit og góðsku, sigur hann. Harumframt er eftirlitið til gagns fyri neytini. Eftirlitið merkir, at sjúka í nógvum førum kann staðfestast, og tískil viðgerast, ógvuliga tíðliga. Hetta hevur ikki minsta týdning, tí vit skulu ansa eftir at neytini hava tað gott, sigur Eirikur Thorvaldsson. Hann heldur, at sambandi ímillum eftirlit og góðsku er so týðiligt, at luttøka í neytaeftirlitinum átti at vera eitt krav til allar mjólkaframleiðarar, og ikki sum nú, upp til tann einstaka bóndan sjálvan at velja.

## Sum at drekka eina øl

Eirikur Thorvaldsson er samdur við Einar Ellingsgaard royndastovuleiðara á Royndarsstøðini, at tað eigur ikki at vera eykaarbeiðið í sambandi við eftirlitið, sum fær bøndurnar at halda seg aftur. “Tað er ikki meira arbeiði av eftirlitinum enn tað er av at drekka eina øl” sigur Eirikur Thorvaldsson. Hann heldur tó, at tað fyrst og fremst er eldra ættarliðið av bøndum, sum ikki vilja vera við í eftirlitinum. Yngru bøndurnir hava lættari við at skilja fyrimunirnar við at vera undir eftirliti, heldur Eirikur Thorvaldsson.






# Edmund er ársins fyrstahjálpari

**Fyri at hjálpa einum starvsfelaga, sum fekk heilabløðing umborð á skipi, varð Edmund Jacobsen í Hoyvík av Reyða Krossi Føroya valdur ársins fyrstahálpari 2001**

ÚTNEVNING
*Edvard Joensen*



*Edmund Jacobsen í Hoyvík varð týsdagin útnevndur ársins fyrstahjálpari*
*Mynd: Edvard Joensen*

Fyri at hjálpa einum starvsfelaga, sum fekk heilabløðing umborð á Havhesti í november í fjør, fekk Edmund Jacobsen í Hoyvík týsdagin handað prógv sum ársins fyrstahjálpari fyri árið 2001. Útnevningin er gjørd av Reyða Krossi Føroya.

Tað var í november mánaða í fjør, at ein maður knappliga gjørdist illa sjúkur, meðan teir vóru staddir einar 60 fjórðingar úr landi.

Støðan var so álvarslig, at boð vórðu send eftir læknahjálp beinanveg, eins og tyrla varð boðsend at flyta mannin á sjúkrahús. Skjótt gjørdist greitt, at fyrstahjálp var neyðug, og avstandurin var so mikið stórur, at tað tók nakað av tíð hjá tyrluni at koma fram.

Meðan tyrlan var á veg út til skipið, gav Edmund alla tíðina sjúka manninum kunstigan andadrátt.

Alla tíðina, meðan Edmund arbeiddi upp á mannin, vóru aðrir av manningi eisini um teir og stuðlaðu og hjálptu til.

Tá tyrlan var komin, gjørdu ymsar umstøður, at ikki bar til at brúka hjálpartólini, sum við vóru, so neyðugt var hjá Edmundi at fylgja við tyrluni til lands, samstundis sum hann alla tíðina helt á við fyrstahjálpini. Maðurin varð síðan lagdur inn á Landssjúkrahúsið. Tá hevði Edmund arbeitt upp á mannin í umleið tríggjar tímar.

Læknin frá donsku sjóverjuni, sum komin var umborð á Havhest, varð verandi eftir, meðan Edmund fylgdi við sjúka manninum til lands.

Edmund greiðir frá, at tá komið varð til lands, vórðu teir móttiknir á tyrlupallinum av Marneri Andreasen, portøri, sum beinanveg fekk andadrátstólið at rigga.

Á B8 vórðu teir móttiknir av Tummasi í Garði, lækna, sum Edmund ynskir at takka fyri góða móttøku og stuðul, eftir at teir vóru komnir inn á sjukrahúsið. Eisini sjúkrasystrarnar vóru sera fryntligar og fyrikomandi og tóku sær væl av honum, sigur Edmund.

Sjúki maðurin varð lagdur í respirator, men so vánalig var heilsustøðan kortini, at hann doyði dagin eftir.

Edmund Jacobsen fegnast um heiðurin, honum er vístur við útnevningin. Hann ynskir at takka Høgna Djurhuus, narkosuyvirlækna, fyri innstilling og Reyða Krossi Føroya fyri útnevning, og vil fegin senda familjuni hjá starvsfelagnum eina heilsu og kondolera avvarðandi.

Edmund sigur, at tað sjálvandi er hugaligt at fáa eins slíka viðurkenning, men at alt hevði verið mun andi lættari, um maðurin hevði livað í dag.

Umframt heiðurin frá Reyða Krossi Føroya fekk Edmund eisini eina peningagávu upp á 3.000,- kr. frá Tryggingarfelagnum Føroyar.

# Tríggir vórðu innstillaðir

**Tríggir mans vórðu innstillaðir til viðurkenningina sum ársins fyrstahjálpari hjá Reyða Krossi Føroya. Útnevningin varð kunngjørd týsdagin**

FYRSTAHJÁLP
*Edvard Joensen*



*Olaf í Garði Joensen fekk heiðursbræv frá Suna Vinther, formanni í Reyða Krossi Føroya*
*Mynd: Edvard Joensen*



*Jim Stanley Løvhøjten, t.h., við heiðursbrævi frá Reyða Krossi Føroya*
*Mynd: Edvard Joensen*

Reyði Krossur Føroya útnevndi týsdagin á fyrsta sinni ársins fyrstahjálpara í Føroyum. Útnevningi varð kunngjørd á samkomu hjá Reyða Krossi á Bryggjubakka í Havn.

Tríggjar innstillingar vóru til ársins fyrstahjálpara fyri árið 2001. Allir innstillaður persónarnir fingu heiðursbræv, meðan tann, sum varð útnevndur, eisini fekk peningagávu aftur at heiðurinum.

Eiðis Bjargingarfelag hevði innstillað Olaf í Garði Joensen á Eiði fyri at hava veitt góða fyrstahjálp til persón, sum var komin rættiliga illa fyri í eini bilvanlukku á Eiði.

Talan var um ungan drong, sum sambært læknanum á staðnum ikki andaði, tá Olaf í Garði Joensen kom til hansara. Olaf gav kunstigan andadrátt og helt soleiðis lív í dronginum, til læknin var komin á staðið. Drongurin varð fluttur á sjúkrahús og er seinni komin heilt fyri seg aftur. Læknin ivaðist ikki í, at Olaf í Garði Joensen bjargaði dronginum.

Av løgregluni í Eysturoy varð Jim Stanley Løvhøjten á Toftum innstillaður fyri at hava bjargað eini ungari gentu, sum var við í eini ferðsluvanlukku á Lambareiði.

Jim var komin á vanlukkustaðið nakað eftir, at ein bilur við fleiri ungum fólkum var farin út av vegnum. Hann hevði breitt klæði yvir gentuna, sum var rættiliga illa fyri orsakað av kulda.

Læknafrágreiðing eftir hendingina segði, at kropshitin hjá gentuni var so lágur, at um ikki ikki varð breitt út yvir hana, tá tað varð gjørt, var hon ivaleyst deyð av kulda, áðrenn hon fekk aðra hjálp.

Vegna Landssjúkrahúsið hevði Høgni Djurhuus, narkosuyvirlækni, innstillað Edmund Sofus Jacobsen í Hoyvik fyri at hava givið fyrstuhjálp undir truplum umstøðum í óvanliga langa tíð til persón, sum raktur var av heilabløðing og ikki sjálvur fekk drigið andan.

Tilburðurin fór fram umborð á Havhesti, sum var til fiskiskap. Edmund fylgdi við sjúklinginum til lands og helt honum á livi, líka til hann kom undir læknahond á Landssjúkrahúsinum.

Av teimum trimum, sum innstillaðir vórðu, varð Edmund Jacobsen útnevndur ársins fyrstahjálpari av Reyð Krossi Føroya.